# Fíggjarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 17. sep. 2025 |
| Mál nr.: | 22/13718 |
| Málsviðgjørt: | TM |
| Ummælistíð: | 17.09.25 til 03.10.25 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn (Eftirlønarlógin)**
(heimildin fyri frítøku í sambandi við tíðaravmarkað starv verður strikað, umframt tekniskar broytingar og fylgibroytingar av broyttari lóggáva á almannaøkinum)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 49 frá 14. mai um eftirløn (Eftirlønarlógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 152 frá 20. desember 2013, løgtingslóg nr. 133 frá 19. desember 2014, § 2 í løgtingslóg nr. 134 frá 19. desember 2014, løgtingslóg nr. 44 frá 6. mai 2015, løgtingslóg nr. 157 frá 24. desember 2015, løgtingslóg nr. 69 frá 30. apríl 2018, § 1 í løgtingslóg nr. 78 frá 7. juni 2020 og løgtingslóg nr. 35 frá 26. mars 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 1, stk. 4 verður "skal" broytt til: "kann".

**2.** § 1, stk. 5 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 5.* Eftirlønarsamansparing hjá persóni, sum hevur uppihildið sær í Føroyum í í mesta lagi 60 mánaðir samanlagt, og sum er fluttur av landinum aftur, kann rindast út aftur, hóast eftirlønarsamansparari ikki hevur nátt fólkapensjónsaldur. Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð nærri reglur."

**3.** Í § 1, stk. 8 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Hevur persónur ikki stovnað eftirlønarkonto innan tríggjar mánaðir frá tí, at persónurin hevur móttikið inntøku, ið eftirlønargjald skal rindast av, kann TAKS vegna persónin stovna eftirlønarkonto hjá góðkendum eftirlønarveitara sbrt. § 5, stk. 1. og flyta eftirlønarsamansparing, ið stendur á depotkonto hjá TAKS sbrt. § 16 a, til eftirlønarkonto hjá persóninum."

**4.** Í § 2, stk. 8 verður aftan á "eftirlønargjaldi" sett: "eftir skatt".

**5.** § 2, stk. 10 verður orðað soleiðis: "*Stk. 10.* Eftirlønargjald av A-inntøku, ið er minni enn 30 krónur, verður ikki álagt at rinda. Eftirlønargjald av B-inntøku, ið er minni enn 500 krónur, verður ikki álagt at rinda."

**6.** Í § 2 verður sum stk. 11 sett: "*Stk. 11.* Skuldkomið eftirlønargjald fellur burtur, tá ið eftirlønarsamansparari nær fólkapensjónsaldur sbrt. lóg um almannapensjónir, ella tá ið eftirlønarsamansparari doyr."

**7.** Í § 3, stk. 1, nr. 10 verður aftan á "12," sett: "13 a,".

**8.** § 3, stk. 1, nr. 11 verður orðað soleiðis: "11) Útgjaldi sambært løgtingslóg um viðbót til ávísar pensionistar."

**9.** § 3, stk. 1, nr. 14 verður orðað soleiðis: "14) Útgjaldi sambært løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, tó undantikið útgjald sambært § 12, § 13 og § 25."

**10.** § 3, stk. 1, nr. 15 verður strikað. Nr. 16 verður eftir hetta nr. 15.

**11.** § 3, stk. 1, nr. 18 verður orðað soleiðis: "18) Inntøka frá arbeiði fyri arbeiðsgevara við heimstaði uttanlands, um løntakarin annaðhvørt rindar til NAV ella hevur eftirlønarskipan uttanlands, sum TAKS metir er nøktandi, og har inngjaldið annaðhvørt einsæris ella saman við inngjaldi í Føroyum er á sama støði sum kravt í § 2, stk. 1. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um, hvat er at meta sum nøktandi eftirlønarskipan uttanlands."

**12.** § 9, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Útgjald av eftirlønarsamansparing, við undantaki av stk. 5 og 9, byrjar fyrsta mánaðin eftir, at eftirlønarsamansparari nær fólkapensjónsaldri sbrt. lóg um almannapensjónir. Í samansparingartíðarskeiðnum er alt virðið, ið er knýtt at eftirlønarsamansparingini, at meta sum kapitaleftirløn við arvarætti, um eftirlønarsamansparari ikki hevur gjørt aðra avtalu."

**13.** § 9, stk. 2, 3. pkt. verður orðað soleiðis: "Í fráboðanini til TAKS verður ásett, hvussu og nær samansparda eftirlønin skal útgjaldast, undir hesum kontonummar og peningastovn, har ið samansparda eftirlønin skal útgjaldast á."

**14.** Í § 9 verður sum stk. 10 sett: "Eftirlønarsamansparari skal í sambandi við útgjald sbrt. stk. 1 og í sambandi við fráboðan sbrt. stk. 2 í seinasta lagi tveir mánaðir áðrenn, útgjald byrjar, lata eftirlønarveitara upplýsingar um peningastovn og kontonummar, har ið samansparda eftirlønin skal útgjaldast á. Eru neyðugu upplýsingarnir um peningastovn og kontonummar ikki latnir eftirlønarveitaranum, tá ið útgjald byrjar, kann eftirlønarveitari flyta útgjaldið á depotkonto, ið ikki fær tilskrivað avkast. Eru upplýsingar um peningastovn og kontonummar hjá eftirlønarsamanslarara ikki latnir eftirlønarveitarar, tá ið útgjald byrjar, kann eftirlønarveitari flyta útgjald á sentrala og løgliga góðkenda, almenna konto hjá eftirlønarsamansparara, sum er tilknýtt Vanganum."

**15.** Í § 10 verður sum stk. 3 sett: "*Stk. 3.* Flyting áðrenn útgjaldsdagin frá eini eftirlønarsamansparing til eina aðra verandi ella nýggja her í landinum fyri sama persón verður ikki viðgjørd sum út- ella inngjalding. Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð nærri reglur."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2026.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið
Uppskotið til broytingar í eftirlønarlógini verður lagt fyri Løgtingið fyri at lætta um umsitingina av eftirlønarlógini fyri borgarar og fyri TAKS.

### 1.2. Galdandi lóggáva
Lógargrundarlagið undir føroyskum eftirlønum er eftirlønarlógin og rentutryggingarlógin. Viðurskiftini kring eftirlønina valdast, hvørjari av hesum báðum lógum, eftirlønin er goldin eftir. Eftirlønarlógin kom í gildi 1. januar 2014. Eftirlønir, sum eru goldnar eftir hetta, verða goldnar sambært eftirlønarlógini.

Rentutryggingarlógin kom í gildi í 1972, og hon var einasta lóg á eftirlønarøkinum, áðrenn verandi eftirlønarlóg kom í gildi. Rentutryggingarlógin heimilaði millum annað frádrátt fyri tær eftirlønir, sum vóru fevndar av lógini, til og við 31. desember 2013, tá eftirlønarlógin tók yvir.

Hetta uppskotið til broytingarlóg, snýr seg um at gera broytingar í eftirlønarlógini.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við lógaruppskotinum er at lætta um umsitingina av eftirlønarlógini fyri borgarar og fyri TAKS. Harafturat er eitt endamál at betra um langtíðarhaldførið í føroysku penssjónsskipanini sum heild.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Í uppskotinum til broytingar í eftirlønarlógini eru tilsamans 15 broytingar, sum mælt verður til at gera í eftirlønarlógini:

1. Í § 1, stk. 4 verður *skal ikki* broytt til *kann ikki*.
2. Frítøka fyri persónar, sum flyta til Føroya í sambandi við tíðaravmarkað starv, verður strikað. Heimild verður at rinda út aftur samansparing í staðin - § 1, stk. 5 í eftirlønarlógini.
3. Depotkontur - § 1, stk. 8 í eftirlønarlógini.
4. Nágreinað verður í § 2, stk. 8, at talan er um ein triðing av eftirlønargjaldinum eftir skatt.
5. Markið fyri, nær TAKS skal senda eftirlønarkrav av B-inntøkum hækkar til 500 kr.
6. Í § 2 verður sum stk. 11 sett: “Stk. 11. Skuldkomið eftirlønargjald fellur burtur, tá ið eftirlønarsamansparari nær fólkapensjónsaldur sbrt. lóg um almannapensjónir, ella tá ið eftirlønarsamansparari doyr.
7. Fylgibroyting orsakað av broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk. § 13 a er sett inn í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk eftirfylgjandi.
8. Rætting í eftirlønarlógini og fylgibroyting av, at heitið á løgtingslóg um viðbót til ávísar pensiónistar er broytt.
9. Fylgibroyting av, at løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur varð sett í gildi 1. januar 2021, og av at samstundis varð sett úr gildi lov nr. 56 af 15. marts 1967 for Færøerne om offentlig forsorg.
10. Fylgibroyting av, at løgtingslóg um stuðul til uppihaldspening er sett úr gildi.
11. Heimild til at persónar, sum hava eftirlønarskipan uttanlands, sum tó ikki rinda lógarkravdu upphæddina til ta skipanina, kunnu rinda munin í Føroyum.

12. Útgjald skulu byrja mánaðin eftir, at eftirlønarsamanspararar náa fólkapensjónsaldri sbrt. lóg um almannapensjónir, tó við undantøkunum í stk. 5 og 9.
13. Ásett verður, at upplýsingar um peningastovn og kontonummar, har ið samansparda eftirlønin skal útgjaldast á, skulu vera í fráboðan til TAKS um, hvussu og nær samansparda eftirlønin skal útgjaldast.
14. Ásett verður, at eftirlønarsamansparari skal lata eftirlønarveitara upplýsingar um peningastovn og kontonummar, har ið samansparda eftirlønin skal útgjaldast á. Eftirlønarveitari kann flyta útgjaldið á depotkonto, ið ikki fær tilskrivað avkast, um upplýsingarnir ikki eru latnir eftirlønarveitaranum. Eftirlønarveitari kann eisini flyta útgjald á sentrala, løgliga góðkenda, almenna konto hjá eftirlønarsamansparara, sum er tilknýtt Vanganum, tá ið hesar væntandi eru liðugt mentar frá 2028.
15. Heimild at flyta eftirløn ella savna saman eftirløn hjá einum veitara - § 10 stk. 3 í eftirlønarlógini.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

Umframt at hava ligið alment frammi á hoyringarportalinum hjá Føroya landsstýri í august og september 2025, er uppskotið eisini sent til ummælis hjá hesum hoyringarpørtum:

Almanna- og mentamálaráðið
Almannaverkið
Kommunufelagið
TAKS
Tryggingareftirlitið
Føroya Arbeiðarafelag
Føroya Arbeiðsgevarafelag (Vinnuhúsið)
Betri Pensjón
Felagið Peningastovnar
Gjaldstovan
Lív
Landsbankin
Landsfelag Pensjónista
Samtak
Fakfelagssamstarvið

Hoyringarsvar eru komin frá Almanna- og mentamálaráðnum, Almannaverkinum, TAKS, Tryggingareftirlitinum, Føroya Arbeiðsgevarafelagi, Felagnum Peningastovnar og Lív. Almanna- og mentamálaráðið, Almannaverkið og Tryggingareftirlitið hava ikki viðmerkingar til lógaruppskotið.

[-].

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Mett verður ikki, at broytingarnar í lógaruppskotinum fara at hava við sær fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan, verður lógaruppskotið samtykt og broytingarnar settar í verk.

Fíggjarmálaráðið metir, at broytingarnar fara at betra um langtíðarhaldførið í føroysku pensjónsskipanini sum heild. Orsøkin er millum annað, at hetta uppskotið fer at tryggja, at eftirlønin kemur til útgjaldingar frá og við almenna fólkapensjónsaldrinum.

Við verandi lóggávu ber til at bíða við at fáa eftirlønina útgoldna, til samanspararar nærkast 80'ára aldur, um fólkapensjónin verður útsett sum longst. Fíggjarmálaráðið metir ikki, at hetta samsvarar við endamálið við tvungnari eftirlønarsamansparing. Fíggjarmálarðið metir heldur ikki, at verandi áseting í nóg stóran mun tryggjar, at fólk fáa gagn av egnari samansparing og hava nóg mikið eftir at liva av tey árini, tey eru pensjónistar.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Mett verður, at broytingarnar fara at lætta um umsitingina av eftirlønarlógini fyri borgarar og fyri TAKS. Fíggjarmálaráðið metir, at lógaruppskotið fer eisini at lætta um umsitingina av skattinum av pensjónsinngjøldum fyri kommunurnar. Orsøkin er, at verður lógaruppskotið samtykt, verður frameftir ikki neyðugt – eins og gjørt verður í dag í fyribilstíðarskeiðnum – at taka fyrst 40% í skatti av øllum inngjøldum, sum síðani út við eitt ár seinni verður regulerað eftir skattastiganum. Hetta fer frameftir at gera tað lættari hjá kommununum at meta um skattainntøkurnar.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Mett verður ikki, at uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna. Verður lógaruppskotið samtykt, fer tað at lætta um umsitingina av eftirløn fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið fer at lætta um umsitingarliga fyri persónar, sum koma til Føroyar at arbeiða í styttri tíðarskeið og sum fara av aftur landinum. Við hesari broytingini skulu persónar, sum koma til Føroya at arbeiða, rinda inn til eftirløn á sama hátt, sum føroyingar skulu. Men vísir tað seg, at teir ikki vera verandi í landinum, og ikki hava verið her longri enn í mesta lagi 60 mánaðir samanlagt, kunnu teir fáa eftirlønarsamansparingina útgoldna ella flutta til eftirlønarskipan teir hava uttanlands.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Millumtjóðasáttmálar eru ikki á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um, og sum Føroyar hava skyldu at fylgja.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar eru ikki, sum eru viðkomandi fyri lógaruppskotið.

**2.9. Markaforðingar**
Uppskotið ger tað smidligari at arbeiða uttanlands hjá útlendskum arbeiðsgevara, og tekur tí burtur ávísar markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, ella ger onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki

**2.11. Skattir og avgjøld**
Í lógaruppskotinum eru ikki ásetingar um skatt ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Í verandi eftirlønarlóg er í § 1, stk. 8, er ein skylda áløgd persónum, ið eru fevndir av lógini, og sum ikki frammanundan hava eina eftirlønarskipan, til at stovna eftirlønarkontu í sambandi við starvsetan, ella í sambandi við, at hann móttekur inntøku, ið eftirlønargjald skal rindast av.

Í hesum uppskotinum er ásett ein freist til persónar at stovna eftirlønarkonto innan tríggjar mánaðir frá tí, at persónurin hevur móttikið inntøku, ið eftirlønargjald skal rindast av. Er hetta ikki gjørt innan freistina, kann TAKS vegna persónin stovna eftirlønarkonto hjá góðkendum eftirlønarveitara og flyta eftirlønarsamansparing, ið stendur á depotkonto hjá TAKS til eftirlønarkonto hjá persóninum.

Grundgevingin er, at TAKS er ikki og kann ikki vera eftirlønarveitari og kann ikki umsita útgjald sambært leistinum í eftirlønarlógini. Ætlanin hevur ongantíð verið, at depotkonturnar hjá TAKS skulu virka sum ein eftirlønarsamansparing.

Lógaruppskotið ásetur, at upplýsingar um peningastovn og kontonummar, har ið samansparda eftirlønin skal útgjaldast á, skulu vera í fráboðan til TAKS um, hvussu og nær samansparda eftirlønin skal útgjaldast.

Lógaruppskotið áleggur eisini eftirlønarsamanspararum at lata lata eftirlønarveitara upplýsingar um peningastovn og kontonummar, har ið samansparda eftirlønin skal útgjaldast á.

Lógaruppskotið leggur ikki aðrar skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Uppskotið hevur við sær, at til ber at rinda út aftur inngjøld, sum persónur, sum hevur uppihildið sær í Føroyum í í mesta lagi 60 mánaðir samanlagt, og sum er fluttur av landinum aftur, hóast eftirlønarsamansparari ikki hevur nátt fólkapensjónsaldur. Landsstýrismaðurin ásetir síðani í kunngerð nærri reglur um hetta.

Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

### 2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

### 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1, nr. 1**
Fíggjarmálaráðið mælir til at broyta orðið “skal” til “kann” í § 1, stk. 4 í eftirlønarlógini. Endamálið við broytingini er at gera greiðari í lógini, at persónar, sum eru farnir í útgjald sambært eftirlønarlógini ikki kunnu halda fram at rinda inn til egna eftirløn sambært eftirlønarlógini samstundis sum teir fáa útgjøld. Fíggjarmálaráðið metir, at hetta hevur verið ætlanin, tá ið eftirlønarlógin varð sett í gildi, men orðaljóðið í § 1, stk. 4 um hetta er óneyðuga ógreitt.

Í serligu viðmerkingunum til § 1, stk. 4, í eftirlønarlógini stendur soleiðis (sí løgtingsmál nr. 121/2012): “*Henda áseting fer at gera greiðan skilnað millum, at tá fólk eru byrjað útgjald av eftirløn, skal ikki longur rindast eftirlønarinngjald. Hesi mugu sostatt fáa ein møguligan eftirlønarpart rindaðan sum vanliga løn*”. Hetta bendir greitt á, at ætlanin frá byrjan av hevur verið, at persónar, sum eru farnir í útgjald kunnu ikki halda fram at rinda inn til egna eftirløn.

**Til § 1, nr. 2**
Við uppskotinum verður frítøkan í verandi § 1, stk. 5 í eftirlønarlógini fyri persónar, ið flyta til Føroya í sambandi við tíðaravmarkað starv, strikað.

Í dag er meginparturin av størvunum, sum útlendingar hava í Føroyum, tíðaravmarkað størv. Upprunaliga vóru bara nøkur heilt fá av hesum størvunum tíðaravmarkað størv. Mett verður, at hetta er orsakað av eftirlønarlógini.

Umsitingarliga byrðan fyri TAKS av verandi skipan við frítøku fyri persónar, ið flyta til Føroya í sambandi við tíðaravmarkað starv, er sera stór.

Við broytingini verður í staðin heimild til at gjalda út aftur eftirlønarsamansparing hjá persónum, sum flyta av landinum aftur. Treytirnar vera at kalla tær somu, sum frítøka verður veitt sambært í dag. Tað vil siga treytað av, at persónurin hevur uppihildið sær í Føroyum í í mesta lagi 60 mánaðir samanlagt og ikki longur arbeiðir ella hevur uppihald í Føroyum.

Við at hava uppihald í Føroyum meinast í hesum sambandi, at persónur hevur lógligt uppihald og fastan bústað í Føroyum.

Í sambandi við at eftirlønin verður útgoldin, verða ikki gjørdar broytingar í skattskyldugu inntøkuni ella í eftirlønarskattinum aftur í tíð.

Við hesari broytingini skulu persónar, sum koma til Føroya at arbeiða, rinda til eftirløn á sama hátt, sum føroyingar skulu. Men vísur tað seg, at teir ikki vera verandi í landinum, og ikki hava verið her longri enn í mesta lagi 60 mánaðir samanlagt og ikki longur arbeiða ella hava uppihald í Føroyum, kunnu teir fáa eftirlønarsamansparingina útgoldna ella flutta til eftirlønarskipan, sum teir hava uttanlands.

Tá skal TAKS bara eftirkanna, um persónurin lýkur treytirnar um tíðarskeið og TAKS og borgarin sleppa undan, at broytingar verða gjørdar í skattskyldugu inntøkuni og í eftirlønarskattinum aftur í tíð. Óneyðugt verður eisini, at TAKS skal hava prógv fyri, at lønarsáttmálar eru tíðaravmarkaðir.

Broytingin merkir, at persónar, sum lúka treytirnar kunnu fáa sítt inngjald út aftur frá eftirlønarveitara, uttan at nakrar broytingar verða gjørdar í skattaviðurskiftunum. Eftirlønarskattur, sum er goldin, verður ikki broyttur. Frádráttur sum er givin í skattskyldugu inntøkuni fyri inngjaldi verður ikki broyttur.

**Til § 1, nr. 3**
Við uppskotinum fær TAKS heimild til at flyta inngjøld, sum standa á depotkonto, til ein av góðkendu eftirlønarveitarunum í Føroyum, og harvið fær TAKS heimild til at stovna eftirlønarkontu vegna persónar, sum ikki sjálvir stovna eftirlønarkontu, sum teir annars hava skyldu til sbrt. § 1, stk. 8 í eftirlønarlógini.

Viðmerkjast skal, at ætlanin ongantíð hevur verið, at depotkontur skulu virka sum eftirlønarsamansparing. TAKS er ikki eftirlønarveitari og kann ikki umsita útgjald sambært leistinum í eftirlønarlógini.

**Til § 1, nr. 4**
Sambært eftirlønarlógini § 2, stk. 8 kann í mesta lagi ein triðingur av tí í stk. 1 ásetta minsta eftirlønargjaldi fara til persónstryggingar, restin skal fara til eftirlønarsamansparing. Álagt er veitarunum at tryggja, at hámarkið verður fylgt.

Í ásetingini í § 2, stk. 8 er ikki nágreinað, hvørt talan er um ein triðing av eftirlønargjaldinum áðrenn ella eftir skatt. Hetta er ein avbjóðing í sambandi við umsitingina av lógini, millum annað fyri eftirlønarveitarar. Hetta millum annað tí, at eftirlønarveitarar hava ikki innlit í, hvørt eftirlønargjaldið samsvarar við ásetta minsta gjaldið í § 2, stk. 1. Tá ið tað er eftirlønarveitarin, ið skal tryggja, at hámarkið verður fylgt, eigur at vera gjørt greitt, at talan er um tað eftirlønargjald, ið veitarin móttekur.

Endamálið við hesari broytingini er at nágreina ásetingina í § 2, stk. 8, soleiðis at greitt er, at talan er um eftirlønargjaldið eftir skatt.

**Til § 1, nr. 5**
Við uppskotinum verður markið fyri, nær TAKS skal senda eftirlønarkrav av B-inntøkum hækkað til 500 kr., so hetta samsvarar við líknandi mark í kapitalvinningsskattalógini.

Sambært eftirlønarlógini § 2, stk. 10 er galdandi mark fyri, nær TAKS sendir krav um gjald til eftirløn, sett til 30 kr. Mett verður ikki, at tað er skynsamt at krevja inn so lítla upphædd, tí eitt krav, sum verður sent við brævi, kostar í dag meira enn 30 kr. at senda. Sambært uppgerð frá TAKS, verða árliga sendar nógvar rokningar fyri eftirløn uppá sera lítlar upphæddir. Til dømis verða árliga sendar væl omanfyri 1.000 rokningar fyri eftirlønargjald frá TAKS uppá upphæddir undir 500 kr.

Sambært § 18 í kapitalvinningsskattalógini verður írestandi skattur, ið er 500 kr. ella minni, ikki kravdur inn.

Fíggjarmálaráðið og TAKS mæla til, at markið fyri, nær TAKS sendir eftirlønarkrav av B-inntøkum, hækkar til 500 kr., so markið samsvarar við líknandi mark í kapitalvinningsskattalógini.

**Til § 1, nr. 6**
Fíggjarmálaráðið og TAKS skjóta upp, at ásett verður í eftirlønarlógini, at eftirlønargjøld (inngjøld), sum enn ikki eru goldin, tá ið persónur doyr, ella nær fólkapensjónsaldur, fella burtur. Mett verður ikki, at nakað høpi er í at heinta inn skuldkomin eftirlønargjøld, tá ið persónur er komin til fólkapensjónsaldur ella at krevja inn eftirlønargjøld frá deyðsbúgvum, tá ið persónur er deyður.

Ásett verður, at skuldkomið eftirlønargjald fellur burtur, tá ið eftirlønarsamansparari nær fólkapensjónsaldur sbrt. lóg um almannapensjónir, ella tá ið eftirlønarsamansparari doyr.

Ásetingin skal skiljast soleiðis, at hon er galdandi fyri øll tílík eftirlønargjøld, sum ikki eru goldin, tá ið broytingin kemur í gildi.

**Til § 1, nr. 7**
Talan er um fylgibroyting orsakað av broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk. § 13 a er sett inn í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk eftirfylgjandi, og eftirlønargjald verður í dag lagt omaná veitingina.

**Til § 1, nr. 8**
Talan er um eina rætting í eftirlønarlógini og fylgibroyting av, at heitið á løgtingslóg um viðbót til ávísar pensiónistar er broytt. Orðið "v.fl." er strikað úr heitinum á lógini, og harafturat verður heitið "pensiónistar" brúkt í tí lógini.

**Til § 1, nr. 9**
Talan er um fylgibroyting av, at løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur varð sett í gildi 1. januar 2021, og av at samstundis varð sett úr gildi lov nr. 56 af 15. marts 1967 for Færøerne om offentlig forsorg.

**Til § 1, nr. 10**
Talan er um fylgibroyting av, at løgtingslóg um stuðul til uppihaldspening er sett úr gildi (løgtingslóg nr. 126 frá 13. desember 2024 um at seta úr gildi løgtingslóg um stuðul til uppihaldspening og løgtingsmál nr: 18/2024).

**Til § 1, nr. 11**
Við uppskotinum verður § 3, stk. 1, nr. 18 broytt, og heimild verður givin til, at persónur, sum hevur eftirlønarskipan uttanlands, men sum tó ikki rindar lógarkravdu upphædd til ta skipanina sbrt. § 2, stk. 1 í eftirlønarlógini, kann rinda munin í Føroyum. So hvørt sum kravda eftirlønargjaldið er hækkað síðstu árini, eru tað fleiri og fleiri persónar, sum ikki rinda tað í lógini kravda prosentið til skipanir uttanlands. Hesar skipanir kunnu annars góðkennast sambært ásetingunum í kunngerðini við heimild í verandi § 3, stk. 1, nr. 18.

Við broytingin verður møguleiki fyri og heimild til, at restupphæddin, upp til kravda prosentið sbrt. eftirlønarlógini, kann rindast í Føroyum. Við broytingini slepst undan, at TAKS skal taka avgerð um, at útlendska skipanin ikki longur er "nøktandi", og við tí avleiðing, at persónurin skal rinda fult gjald í Føroyum, tí skipanin ikki lýkur treytirnar fyri undantakinum.

**Til § 1, nr. 12**
Ásett verður við hesi broytingini til § 9, stk. 1., at útgjald skulu byrja mánaðin eftir, at eftirlønarsamanspararar náa fólkapensjónsaldri sbrt. lóg um almannapensjónir, tó við undantøkunum í stk. 5 og 9. Seinni partur av § 9, stk. 1 verður ikki broyttur sbrt. uppskotinum.

Sbrt. verandi orðing er ásett, at útgjald av eftirløn kann í fyrsta lagi byrja, tá ið eftirlønarsamansparari nær fólkapensjónsaldri sbrt. lóg um almannapensjónir, og í seinasta lagi tann dagin, hann fær fólkapensjón. Millum annað orsakað av møguleikanum at útseta útgjaldið av fólkapensjón, er hendan ásetingin við tíðini vorðin ógreið og torfør at umsita fyri eftirlønarsamansparar, arbeiðsgevarar og eftirlønarveitarar.

Tvey høvuðsendamál eru við broytingini, sum skotið verður upp at gera viðvíkjandi § 9, stk. 1. Fyrra endamálið er at gera ásetingina greiðari og lættari at umsita fyri fyri eftirlønarsamansparar, arbeiðsgevarar og eftirlønarveitarar. Seinna endamálið er at tryggja, at eftirlønin kemur til útgjaldingar frá og við almenna pensjónsaldrinum.

Fíggjarmálaráðið metir, at skal eftirlønarsamansparingin vera til gagns fyri samansparararan og fyri samfelagið, er neyðugt, at samansparingin tryggjar, at fólk í størri mun fíggjarliga kunnu forsyrgja sær sjálvum, so hvørt sum tey gerast pensjónistar og, sum frálíður, gevast at arbeiða.

Eisini er neyðugt, at eftirlønin kemur til útgjaldingar frá og við almenna pensjónsaldrinum. Við verandi lóggávu ber til at bíða við at fáa eftirlønina útgoldna, til samansparar nærkast 80'ára aldur, um fólkapensjónin verður útsett sum longst. Fíggjarmálaráðið metir ikki, at hetta samsvarar við endamálið við tvungnari eftirlønarsamansparing. Fíggjarmálarðið metir heldur ikki, at verandi áseting í nóg stóran mun tryggjar, at fólk fáa gagn av egnari samansparing og hava nóg mikið eftir at liva av, meðan tey eru pensjónistar.

Eitt atlit hjá Fíggjarmálaráðnum í sambandi við broytingarnar í § 9, stk. 1 og í § 1, stk. 4 hevur verið at tryggja í fyrra lagi, at samansparar ikki kunnu rinda *inn* til sína egnu eftirløn, *samstundis* sum at rindað verður *út* úr samanspardu eftirlønini. Í øðrum lagi hevur endamálið verið at tryggja, at útgjøld úr samanspardu eftirlønini byrja, samstundis sum at inngjøldini til eftirlønina steðga. Hetta fer at gera skipanina við eftirlønarsamansparing munandi lættari at umsita fyri samansparar, eftirlønarveitarar, arbeiðsgevarar og TAKS, millum annað tá ið umræður tilskriving av avkasti og líknandi.

**Til § 1, nr. 13**

Við hesi broytingini til § 9, stk. 2., 3. pkt. verður ásett, at upplýsingar um kontonummar og peningastovn, har ið samansparda eftirlønin skal útgjaldast á, skulu vera við í fráboðanini til TAKS um, hvussu og nær samansparda eftirlønin skal útgjaldast.

Endamálið við hesum er at tryggja, at eftirlønarveitarar hava og fáa neyðugu upplýsingarnar um kontonummar hjá samanspararum, sum skulu byrja útgjald. Í summum førum fáa eftirlønarveitarar ikki upplýst kontonummar, og kunnu tí skil ikki gjalda út, hóast samansparari fær fólkapensjón. Í summum førum kann samansparingin standa leingi hjá eftirlønarveitarum uttan at til ber at gjalda hana út. Í ringasta er hugsandi, at samansparar ynskja at úseta útgjald, soleiðis at hetta kemur at ávirka mótrokning í almennari veiting. Endamálið við broytingini í § 9, stk. 2., 3. pkt. er at forða fyri, at tílíkar støður kunnu koma fyri.

**Til § 1, nr. 14**

Við uppskotinum til nýtt stk. 10 í § 9 verður ásett, at eftirlønarsamansparari skal lata eftirlønarveitara upplýsingar um peningastovn og kontonummar, har ið samansparda eftirlønin skal útgjaldast á. Eftirlønarveitari kann flyta útgjaldið á depotkonto, ið ikki fær tilskrivað avkast, um upplýsingarnir ikki eru latnir eftirlønarveitaranum. Eftirlønarveitari kann eisini flyta útgjald á sentrala, løgliga góðkenda, almenna konto hjá eftirlønarsamansparara, sum er tilknýtt Vanganum, tá ið hesar væntandi eru liðugt mentar frá 2028.

**Til § 1, nr. 15**
Við uppskotinum verður heimild til at flyta eftirløn ella at savna saman eftirløn hjá einum veitara. Hetta verður eftir uppskotinum ásett sum nýtt stk. 3 í § 10.

Í § 10 í eftirlønarlógini er ein heimild at savna saman eftirlønir hjá fleiri veitarum, tá farið verður í útgjald. Í galdandi eftirlønarlóg er eingin heimild at flyta eftirløn millum veitarar ella at savna saman, áðrenn útgjald byrjar.

Vísast kann á, at tílík heimild at flyta skipan frá einum veitara til annan, uttan at hetta verður roknað sum útgjald, er í § 9 í rentutryggingarlógini. Við hesari broytingin verður líknandi heimild ásett í § 10 í eftirlønarlógini.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu. Ásett verður, at løgtingslógin kemur í gildi 1. januar 2026.

Fíggjarmálaráðið, 17.09.2025.

**Ruth Vang**
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: